# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hava danir gloymt, hvat hendi Theo van Gogh? Vit hava í hvussu er ikki gloymt tekningarnar av profetinum*

*al-Qaeda*

# Sarah Palin vorðin ein byrða fyri John McCain

**Í fyrstani gav hon valstríðnum hjá republikanarunum nýtt lív, men nú halda fleiri, at Sarah Palin var ikki tað rætta valið kortini**

Tá John McCain kom á landsfundin hjá republikanska flokkinum í september og boðaði frá, at tann lutfalsliga ókendi guvernørurin í Alaska, Sarah Palin, var hansara varaforsetavalevni, mundi fagnaðurin á fundinum ongan enda fingið. Her høvdu republikanararnir funnið eina kvinnu av meðalstætt, og so tosaði hon eitt mál og um evni, sum tann vanligi amerikanarin skilti og hevði áhuga fyri. Harafturat var hon konservativ, og tað kundi fáa fatur á teimum høgraveljarunum, sum ikki eru serliga fegnir um McCain.

Men síðani er nógv broytt. Tað eydnaðist demokratunum at vísa á, at Sarah Palin hevur als ongar uttanríkispolitiskar royndir, og at hon als ikki er búgvin at taka við sum møguligur forseti, um okkurt skuldi hent tí 72 ára gamla McCain. Harafturat høvdu demokratarnir hepni við at halda uppá, at avgerðin hjá McCain av velja ein so óroyndan varaforseta avdúkaði tvørrandi dømievni hansara.

Nógvir republikanarar hava eisini vent sær ímóti valinum hjá McCain. Peggy Norman, sum er millum teir fremstu republikonsku viðmerkjararnar, sigur við National Review, at eftir hennara tykki eigur Sarah Palin at taka seg aftur sum varaforsetavalevni. Sambært Peggy Norman var Sarah Palin ein fyrimunur fyri flokkin, men er nú vorðin ein byrða.



*Sarah Palin er vorðin ein byrða fyri republikanararnar*

*Mynd: Polfoto*

Michele Swers, sum er professari á Georgetown University, heldur, at Sarah Palin kann vera ein orsøk til, at undirtøkan hjá McCain hevur verið viknandi í seinastuni, soleiðis sum meiningakanningarnar hava víst.

## Løgreglan fekk køliskáp við mannahøvdum

**Rúsevnastríðið í Meksiko gerst altsamt meiri óhugnaligt, og tað er næstan einki mark fyri, hvat harkaliðini kunnu finna upp á**

Nú um dagarnar kom eitt flutningsfelag við einum kassa til eina løgreglustøð har norðuri í Meksiko. Á fylgiskjalinum stóð, at talan var um heilivág, men tá løgreglan breyt kassan upp, vísti tað seg at vera eitt køliskáp, og í tí lógu fýra mannahøvd og eitt bræv, skrivar AP. Meksikanska løgreglan veit ikki, hvørjum tey fýra høvdini eru av, og hon vil ikki siga, hvat stóð í brævinum, sum lá í køliskápinum.

Løgreglustøðin, sum fekk kassan, er stutt frá amerikanska markinum, og stjórnin í Washington kunngjørdi í gjár, at Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, fer til Meksiko seinni í vikuni at tosa við myndugleikarnar har um tað óhugnaliga stríðið ímillum tey meksikonsku rúsevnaharkaliðini.

Hildið verður, at rúsevnastríðið hevur kostað umleið 4.000 mannalív higartil í ár. Í fjør var talið um 2.700.

# Hann bíðar eftir at verða hongdur

**Mohammedreza Haddadi var 15 ára gamal, tá hann bleiv dømdur til deyða í Iran. Í dag er hann 19 og bíðar eftir gálganum**



*Mohammedreza Haddadi var 15 ára gamal, tá hann bleiv dømdur til deyða*

*Mynd: Reuters*

Mohammedreza Haddadi var 15 ára gamal, tá hann og tríggir vaksnir skyldmenn beindu fyri einum eldri bilførara í iranska býnum Shiraz. Tá málið kom fyri rættin, játtaði Mohammedreza, at tað var hann, sum hevði beint fyri bilføraranum. Sambært næstringunum tók hann ábyrgdina á seg, tí hinir tríggir høvdu lovað honum pengar afturfyri. Teir høvdu eisini vissað hann um, at hann bleiv ikki revsaður, tí hann var so ungur.

Men tá mamma hansara vitnaði og greiddi frá, at hvørki hon ella sonurin høvdu fingið nakrar pengar, tók Mohammedreza sína frágreiðing aftur. Tað gjørdi kortini ikki mun, tí rætturin kom til ta niðurstøðu, at hann var høvuðsmaðurin, og sum tann einasti av teimum fýra ákærdu bleiv Mohammedreza dømdur til deyða.

Tað eydnaðist kortini at fáa avgerðina fyri ein hægri rætt, sum kom til ta niðurstøðu, at Muhammedreza var ósekur, men av einari ella aðrari orsøk bleiv deyðadómurin standandi.

Iranska stjórnin hevur skrivað undir barnarættindasáttmálan hjá ST, sum millum annað sigur, at eingin kann takast av døgum fyri brotsverk, sum viðkomandi framdi, áðrenn hann/hon hevði fylt 18 ár. Kortini verða fleiri ungfólk dømd til deyða og tikin av døgum í Iran. Higartil í ár eru minst seks ungdómar avrættaðir, og meiri enn 150 standa á bíðilista.

Teirra millum Muhammedreza Haddadi. Eftir ætlanini skuldi hann heingjast tann 9. oktober, men tveir dagar undan ásetta degnum bleiv avrættingin útsett orsakað av trýsti uttaneftir, skrivar Reuters.

## STUTT SAGT

### Óheppin skipsvitjan

Peter Mandelsohn, sum júst er tilnevndur bretskur handilsmálaráðharri, kann vænta sær nakrar ágangandi spurningar, tá hann skal til hoyringar í einari nevnd hjá Parlamentinum um eina vitjan umborð á einum stuttleikaskipi, sum russiski oljuríkmaðurin Oleg Deripaska.eigur.

Peter Mandelsohn kann tó ugga seg við, at tinglimirnir úr tí konservativa andstøðuflokkinum hava nóg mikið at hugsa um sjálvir, tí tað vísir seg, at ein av teimum fremstu konservativu politikarunum, Georg Osborne, hevur eisini vitjað umborð á sama stuttleikaskipi, tá tað lá við bryggju á griksku oynni Korfu í summar.

Blaðið The Times hevur frá einari álítandi keldur fingið at vita, at Oleg Deripaska beyð sær til at lata valgrunninum hjá konservativa flokkinum 50.000 pund. Peningin skuldi hann flyta frá einum felagi, sum hann eigur í Bretlandi, tí sambært bretskari lóg kunnu flokkar ikki taka ímóti fíggjarligum stuðuli uttaneftir.

Talsmenn hjá konservativa flokkinum hava avsannað, at flokkurin hevur fingið tilboð um stuðul frá russiska oljuríkmanninum, men teir viðganga, at Osborne var umborð á stuttleikaskipinum.

Peter Mandelsohn hevur viðgingið, at hann var umborð á skipinum hjá Oleg Denipaska, meðan hann var ES-kommiserur í handilsmálum, men hann vísir aftur, at vitjanin hevði nakað politiskt mál. Bretskir fjølmiðlar skriva, at Mandelsohn sleppur tó ikki undan at svara spurningum um vitjanina.



*Peter Mandelsohn kann vænta sær ágangandi spurningar*

*Mynd: Reuters*